## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin milum 11 og 14 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið lot av landsynningi og møguliga ælingur. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og okkurt ælið, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin gul til stívt andøvsgul av útsynningi og turt, men um kvøldið veksur hann vindin av landsynningi og regn. Sunnudagin strúkur í vindi av vestri og ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.

# Jól í juli



*Vit eru í juli mánað, men hóast tað, so var henda daman, sum arbeiðir á Verkstaðnum Virkni, í Sandágerði í gjár, og heintaði tara, sum skal brúkast til jólapynt seinni í ár*
*Mynd: Finnur Justinussen*

**Tey, sum gera jólapynt at selja, arbeiða alt árið runt. Í gjár var eitt av starvsfólkunum á Verkstaðnum Virkni í Sandágerði og heintaði tara**

JÓLAPYNT
*Ingrid Bjarnastein*

Long fyrireiking krevst til at gera jólapynt til tær vælumtóktu jólasølurnar hjá teimum ymsu verkstøðunum kring landið.

Í gjár var eitt av starvsfólkunum á Verkstaðnum Virkni og heintaði tara í Sandágerði. Hon segði, at tarin skal turkast og síðani gerast til kransar saman við ullnissum. Teir verða ógvuliga vakrir, og eru ógvuliga væl umtóktir.

Men tað er ikki altíð tað ber til at heinta tara. Hetta var onnur ferðin í ár, farið varð oman í Sandágerð eftir tara. Tá flóð er, ber ikki til, men tá tað er fjøra, er ongin trupulleiki.

Nú verður spennandi at síggja, hvat tey av Verkstaðnum fáa burturúr øllum taranum, ið heintaður varð í gjár.


...hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT Spf.





fæst á apotekunum kring landið


### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 12 |
| Nuuk | 15 |
| Qaqortoq | 14 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | 19 |
| Halifax | 21 |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 17 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 20 |
| Paris | 25 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 31 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 19 |
| New York | 31 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | |
| Buenos Aires | 9 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 996 hPa við Føroyar stendur mestsum í stað og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1002 hPa yvir Ermasundi fer í landnyrðing norðan og dýpist nakað.




**Í dag:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Føroyum fer í útnyrðing og lágtrýstið vestan fyri Skotland stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/07 kl. 06⁰⁰– 09/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 10,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,9 mm – mált frá 08/07 kl. 06⁰⁰– 09/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 6,2 mm


TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
Tlf. 213212


## VESTFALLSKYRRINDI

11. juli: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. juli | 07.20 | 19.47 | 06.20 | 18.47 | 06.35 | 19.02 | 09.20 | 21.47 | 10.20 | 22.47 | 05.35 | 18.02 | 04.35 | 17.02 | 07.35 | 20.02 | 08.35 | 21.02 | 07.05 | 19.32 | 08.20 | 20.47 |
| 11. juli | 08.14 | 20.41 | 07.14 | 19.41 | 07.29 | 19.56 | 10.14 | 22.41 | 11.14 | 23.41 | 06.29 | 18.56 | 05.29 | 17.56 | 08.29 | 20.56 | 09.29 | 21.56 | 07.59 | 20.26 | 09.14 | 21.41 |
| 12. juli | 09.06 | 21.32 | 08.06 | 20.32 | 08.21 | 20.47 | 11.06 | 23.32 | — | 12.06 | 07.21 | 19.47 | 06.21 | 18.47 | 09.21 | 21.47 | 10.21 | 22.47 | 08.51 | 21.17 | 10.06 | 22.32 |
| 13. juli | 09.56 | 22.21 | 08.56 | 21.21 | 09.11 | 21.36 | 11.56 | — | 00.32 | 12.56 | 08.11 | 20.36 | 07.11 | 19.36 | 10.11 | 22.36 | 11.11 | 23.36 | 09.41 | 22.06 | 10.56 | 23.21 |
| 14. juli | 10.44 | 23.07 | 09.44 | 22.07 | 09.59 | 22.22 | 00.21 | 12.44 | 01.21 | 13.44 | 08.59 | 21.22 | 07.59 | 20.22 | 10.59 | 23.22 | 11.59 | — | 10.29 | 22.52 | 11.44 | — |

5 707265 100036 >